UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

**Miðnámsskúlarnir**

Dagfesting: **15. apríl 2020**
Tygara ref**.:**
Máltal**.: 20/00274**

**Próvtøkutíðarskeiðið á sumri 2020**

Eftir at danir hava avgjørt, hvussu verður við próvtøkunum í Danmark í summar, er avgjørt at vit í Føroyum taka somu atlit, og skipa próvtøkurnar eftir sama leisti. Hædd verður tó tikin fyri, at okkara skipan er ikki meinlík tí donsku, og miðað verður ímóti, at arbeiðsbyrðan hjá føroyskum og donskum næmingum er sambærlig.

Hildið verður fast við, at seinasti undirvísingardagur hjá endaflokkunum er 15. mai 2020. Próvtøkuætlanin og ársmetini hjá endaflokkunum verða kunngjørd næmingum og lærarum henda dag.

Í tíðarskeiðnum fram til seinasta undirvísingardag skal møguleiki verða fyri fakligari einstaklinga samrøðu ímillum lærara og næming á fyrireikingarbreytini. Hetta fyri at styrkja grundarlagið fyri ársmetinum, og er serliga týdningarmikið, tí ársmet ikki vanliga verða givin á hesi breyt.

Próvstovan ger raðfestingarlista, sum er grundarlagið undir próvtøkunum. Hildið verður fast við, at uttanhýsis próvdómarar verða nýttir, men tá talan er um sjálvlesandi er tó møguleiki fyri at brúka innanhýsis próvdómara.

Farið verður til próvtøku eftir hesum leisti:

| Gymnasialt miðnám | Skrivligar próvtøkur | Munnligar próvtøkur | Próvtøkur tilsamans |
|---|---|---|---|
| 3. árs næmingar á HUG, BÚS, NÁT, TIL, TØK | Øll skulu til próvtøku í føroyskum. | Øll skulu til próvtøku í einari lærugrein sambært raðfestingarlistanum. | 2, ein skrivlig og ein munnlig.<br>Í restina av lærugreinunum, sum trektar eru til próvtøku verður ársmetið flutt til próvtal. |
| 2. árs næmingar á FYR | 2 lærugreinar.<br>øll skulu til próvtøku í føroyskum. Hartil einari sambært raðfestingarlistanum. | 2 lærugreinar<br>øll skulu til próvtøku í føroyskum. Hartil einari sambært raðfestingarlistanum. | 4, tvær skrivligar og tvær munnligar<br>Í restina av lærugreinunum verða ársmet givin sum próvtøl. |
| 1. og 2. árs næmingar á HUG, BÚS, NÁT, TIL, TØK | | | 0<br>Í lærugreinum, sum trektar eru til próvtøku verður ársmetið flutt til próvtal. |

Tinghúsvegur 5-7 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☏ +298 30 65 00 • ✉ ummr@ummr.fo • www.ummr.fo

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1.árs næmingar á FYR | | | 0<br>Í lærugreinum, sum enda í ár verða ársmet givin sum próvtøl. |
| Næmingar, sum taka útbúgvingina yvir fleiri ár, og eru á næstsíðsta ella síðsta ári. | Til próvtøku í føroyskum um tey enda hesa lærugreinina í ár. | Serstøk próvtøkuætlan. | Serstøk próvtøkuætlan.<br>Í restina av lærugreinunum, sum trektar eru til próvtøku verður ársmetið flutt til próvtal. |
| Stakgreinalesandi | | | Í mesta lagi 4, miða verður móti at tvær eru skrivligar og tvær munnligar<br>Í restina av lærugreinunum verða ársmet givin sum próvtøl. |
| Sjálvlesandi | | | Til próvtøku í øllum lærugreinum. Onkur próvtøka kann verða flutt til sjúkraprótøkuskeiðið. |
| Næmingar, sum eru frítiknir fyri próvtøku í føroyskum, vegna fremmandmálsligt bakstøði | Øll skulu til próvtøku í einari lærugrein. Miða verður eftir at hetta verður ein mállærugrein t.d.enskt. | Øll skulu til próvtøku í einari lærugrein sambært raðfestingarlistanum. | 2, ein skrivlig og ein munnlig.<br>Í restina av lærugreinunum, sum trektar eru til próvtøku verður ársmetið flutt til próvtal. |

**Næmingar, sum taka útbúgvingina yvir fleiri ár**
Serstøk próvtøkuætlan verður gjørd fyri hesar næmingar. Av tí, at fleiri teirra eftir ætlan enda lærugreinar á A-stigi, meðan teir ganga á næstsíðsta ella síðsta ári, skulu hesir næmingar til próvtøku nú. Hædd verður tikin fyri, at hesir næmingar ikki skulu til fleiri próvtøkur enn aðrir næmingar. Hetta er eisini galdandi fyri næmingar, sum ganga í serflokkinum á Glasir.

**Aðrir næmingar, sum taka útbúgvingina eftir serligari skipan**
Serstøk próvtøkuætlan verður gjørd fyri hesar næmingar. Hædd verður tikin fyri, at hesir næmingar ikki skulu til fleiri próvtøkur enn aðrir næmingar.

**1. og 2. árs næmingar á 3 ára breytunum og 1. árs næmingar á fyrireikingarbreytini**
Undirvísingin hjá næmingunum í 1. og 2. s umframt 1. árs næmingunum á fyrireikingarbreytini heldur fram eftir 15. mai, og ársmet verða givin seinasta undirvísingardag, sum er 5. juni. Í tíðarskeiðnum fram til seinasta undirvísingardag skal vera møguleiki fyri, at starvstovu royndir

og líknandi verða skipaðar, umframt møguleiki er fyri at skipa venjingar ella annað, sum ikki hevur verið møguligt, meðan neyðundirvísing hevur verið.

Mælt verður ikki til at skúlarnir skipa fyri vanligum ársroyndum, men aftaná seinasta undirvísingardag, kann skúlin skipa fyri skrivligum og/ella munnligum royndum umvegis netið, umframt øðrum møguligum eftirmetingum av undirvísingini, og á tann hátt miða ímóti, at skúlaárið fyri allar næmingar endar á skilagóðan hátt, áðrenn seinasta skúladag 26. juni.

**Yrkisútbúgvingar**
Skúlagongdin hjá næmingum á yrkisútbúgvingunum byrjar aftur 20. apríl, og síðsti undirvísingardagur er sum vanligt. Hædd verður tikin fyri tilmælunum hjá heilsumynduleikunum, og undirvísingin verður skipað sambært hesum.

Í sambandi við próvtøkurnar, verður hesin leistur brúktur:

| **Yrkisnám** | **Almennar lærugreinar** | **Yrkislærugreinar** |
|---|---|---|
| Bil, El, Maskin, Smiðja, Timbur, Hárfríðkan og Matvøra | Skúlin skipar sjálvur fyri innanhýsis próvtøkum í lærugreinum á D-, E- og F-stigi | Skúlin skipar próvtøkurnar í samráð við Yrkisdepilin. |
| Støðisútbúgving innan fyrisitingarøkið, handilsøkið og skrivstovuøkið (FHS) | Næmingarnir fara til 1 próvtøku sambært raðfestingarlistanum. Í restina av lærugreinunum, sum trektar eru til próvtøku verður ársmetið flutt til próvtal. | Næmingarnir fara til próvtøku í føstu verkætlanini. |
| Støðisútbúgving innan fyrisitingarøkið, handilsøkið og skrivstovuøkið Stakgreinalesandi (lærlingar) | Næmingarnir fara til 1 próvtøku sambært raðfestingarlistanum. Í restina av lærugreinunum verða ársmet givin sum próvtal. | Skúlin skipar hendan partin í samráð við Yrkisdepilin. |
| Klædnaatstøðingur og Tilvirkisatstøðingur | Skúlin skipar saman við Próvstovuni fyri próvtøkunum. | Skúlin skipar próvtøkurnar í samráð við Yrkisdepilin. |

Vinarliga

Uttanríkis- og mentamálaráðið

Jenis av Rana
*landsstýrismaður*

Poul Geert Hansen
*aðalstjóri*

Tinghúsvegur 5-7 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☎ +298 30 65 00 • ✉ ummr@ummr.fo • www.ummr.fo